Vika 23:
Leiðin til Keypmannahavn
8 síður við spennandi tilfarið um summar

# Tann deiliga **Keypmannahavn**



**Hóast vit ofta nýta Keypmannahavn til eina millumlending, so er høvuðsstaðurin í Danmørk væl verdur at vitja**

**KEYPMANNAHAVN**
**Eirikur í Jákupsstovu**
eij@sosialurin.fo

Ráðhúsplássið er altíð eitt gott stað at byrja, um tú ikki reiðiliga veitst, hvat tit skulu finna uppá í deiligu Keypmannahavn

Vit seta ofta Keypmannahavn í samband við eitt stað, har vit eru noydd at fara. Vit lesa, vitja familju ella millumlenda fyri at koma til heitari himmalhválv. Men tímir tú ikki ógvusliga hitan sunnanfyri, ella hevur nakrar dagar eyka, so er Keypmannahavn ein deiligur býur.

Tað eru rættiliga nógvir møguleikar at vitja. Har er lítla havfrúgvin, ráðhúsplássið, rundatorn, Tivoli, planetarium, eksperimentarium, djóragarð og so framvegis.

Og kennist visakortið ov tjúkt, so er tað upplagt at fara í Fields, á Strøgið, á Fiskatorgið og Amagersentrið, har tú sjálvandi fært tynt eitt sindur um tað.

Keypmannahavn er somuleiðis ein veldigur býur í so máta, at har er ein rúgva av føroyingum, so tú kennir ivaleyst onkran, har tú kanst beita mannin saman við børnunum, meðan tú sjálv gongur við visakortinum hjá honum á strøgnum, og keypir jólagávurnar til teg sjálva.

Fert tú við familjuni, so er altíð stuttligt at ganga ein túr í býnum, og tosa um, hvørjar av gøtunum børnini ofta hava keypt í Matador, og so kunnu tey eisini læra, hví ráðhúsplássið er dýrasta gøtan í spælinum, áðrenn tit seta tykkum væl til rættis á Jensens Bøfhus, har tú kanst eta so nógvan ís, sum tú vilt, ella eitt annað stað í miðbýnum í hugnaliga umhvørvisvinarliga býnum.

Ein annar stórur fyrimunur við Keypmannahavn, í mun til aðrar býir, er at Danmark hevur eina serstakliga góða skipan við almennum flutningi, so tá tú setir teg í tokið frá Kastrup til hovedbanegården, so kanst tú við góðari samvitsku hugsa um umhvørvið.

Næstseinasti møguleikin, ið her verður nevndur, er sjálvandi at nýta Keypmannahavn til basa fyri øðrum lítlum ferðum. Til Noregs við Oslobátinum, til Svøríkis yvir um Oyrasund, har brúgvin er ein sonn sjón í sær sjálvum, samstundis, sum tað altíð ber til at taka tokið á túrinum niður gjøgnum Evropa, tá tú veruliga hevur góða tíð.

Skeldast tú og maðurin nakað nógv í løtuni, so ber eisini til at rýma til Keypmannahavnar saman í eitt vikuskifti. Býurin er romantiskur sum fáur, við øllum teimum gomlu støðunum tit kunnu vitja, og so inn á hotellið, har ongin skal hugsa um morgunmat, døgverða ella nakað annað, ið hoyrir vanliga dagliga stríðnum til.

So tær nýtist ikki neyðturviliga at vera noydd til Danmarkar at lesa ella læra, fyri at kunna njóta deiligu Keypmannahavn, sum lokalu ferðastovurnar hava doypt stórbýin.



Oyrasundsbrúgvin er eitt meistaraverk, sum eigur at skoðast, hóast tit ikki hava ætlanir at fara yvir um

**Áðrenn tú fert til Keypmannahavnar er altíð eitt hugskot at vitja heimasíðuna, www.visitcopenhagen.com, har tú kanst kanna, hvat gongur fyri seg í býnum, samstundis, sum eitt stórt arbeiði verður lagt í at greiða frá, júst hvørjar møguleikar tú og tín familja hevur.**

Melda teg til Club Atlantic og
VINN FERÐASEÐLAR
og fá sertilboð sendandi við teldupostí
Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
Melda til á: www.atlantic.fo



Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo